## Álitisfólkaskipan Føroya Lærarafelags

§ 1. Til álitisfólk og varaálitisfólk kunnu veljast lærarallærdir limir í Føroya Lærarafelag, sum hava
sítt høvuðsstarvstað á staðnum, tey eru vald, og sum hava verið í starvi í minst eitt ár.
Valskeiðið er tvey ár. Valið fer fram í mars mánaði hvørt stak ár.

Landið er skipað í álitisfólkaøki soleiðis:

Á Skúlatrøð, Mikladals / Trøllanes skúli (2 álitisfólk).
Eiðis skúli og Funnings skúli.
Eysturskúlin.
Fuglafjarðar skúli.
Hoyvíkar skúli.
Hvalbiar skúli og Sandvíkar skúli.
Hvalvíkar skúli, Hósvíkar skúli, Haldórsvíkar skúli og Tjørnuvíkar skúli.
Kollafjarðar skúli.
Nám, Mentamálaráðið, Søvn Landsins og Bókadeild Føroya Lærarafelags.
Nólsoyar skúli, Kaldbaks skúli, Kirkjubøar / Velbastaðar skúli og Hests skúli.
Runavíkar kommunuskúli.
Sandoyar Meginskúli.
Sands skúli, Skopunar skúli, Skálavíkar skúli og Dímunar skúli.
Sankta Frans skúli.
Sernámsdepilin og Skúlin á Trøðni.
Skála skúli, Funningsfjarðar skúli og Oyndarfjarðar skúli.
Skúlin á Argjahamri.
Skúlin á Fløtum (2 álitisfólk).
Skúlin á Fossánesi, Viðareiðis skúli, Haraldsunds skúli, Kunoyar skúli, Húsa / Syðradals skúli, Svínoyar skúli og Kirkju / Hattarvíkar skúli.
Skúlin á Giljanesi.
Skúlin í Eysturkommunu.
Skúlin við Løgmannabreyt.
Skúlin við Streymin.
Sørvágs skúli og Mykines skúli.
Stranda skúli.
Tofta skúli.
Tvøroyrar skúli.
Vágs skúli, Sumbiar skúli, Porkeris skúli, Hovs skúli og Fámjins skúli.
Vestmanna skúli og Kvívíkar skúli.

**Valreglur**:

Í hvørjum álitisfólkaøki verða vald-álitisfólk og eitt varaálitisfólk við vanligum meiriluta av møttum limum (t.v.s. vanligum limum sambært § 3 í viðtøkum felagsins). Í økjum við fleiri skúlum skipar álitisfólkið fyri, at kontaktpersónur verður valdur á hvørjum skúla sær.

Valið hevur gildi, tá ið Føroya Lærarafelag hevur góðkent tað, og hevur boðað skúlans leiðslu frá valinum. Henda fráboðan eigur at verða gjørd í seinasta lagi 14 dagar eftir valið.

§ 2. Føroya Lærarafelag kunnar um lógir, sáttmálar og aðrar avtalur. Álitisfólkið heldur eyga við, at tær vera yvirhildnar. Álitisfólkið, ið er talsmaður limanna, hevur saman við leiðsluni ábyrgd av, at limirnir verða kunnaðir og tiknir við í ráðum um mál, ið viðvíkja arbeiðsplássinum.

Álitisfólkið skal eins og leiðslan syrgja fyri best møguligum samstarvi og góðum arbeiðsviðurskiftum. Álitisfólkið hevur tagnarskyldu.

§ 3. Álitisfólkið hevur rætt og skyldu til at leggja fyri skúlans leiðslu uppskot, áheitanir og klagur frá limunum, og kann taka upp samráðingar við leiðslu skúlans um innanhýsis viðurskifti.

Álitisfólkið skal vera ráðgevandi fyri leiðslu og limir um arbeiðsviðurskifti, rættindi og skyldur. Álitisfólkið hevur skyldu at kunna limirnar í økinum og Føroya Lærarafelag um øll viðkomandi viðurskifti.

§ 4. Við skúlaársbyrjan verða avsettir tímar til álitisfólkaarbeiði, alt eftir, hvussu nógvir lærarar starvast í økinum. Lærari, sum hevur setanarbrot minni enn 0,37 í skúlanum, men hevur meira enn hetta samanlagt við aðrari setan í forskúlanum ella fólkaskúlanum,telur við. At røkja álitisfólkaarbeiðið verða settir av 24 tímar + 1,5 tíma fyri hvønn lærara í økinum. Hesir tímar eru ætlaðir til arbeiðið alt.

Álitisfólkið skal í serligum føri - í samráð við leiðslu skúlans - hava rætt til í arbeiðstíðini at taka sær av málum, ið viðvíkja starvsfeløgum ella arbeiðsviðurskiftum á staðnum, tó soleiðis, at tað tarnar skúlans arbeiði sum minst.

Álitisfólkið hevur rætt til farloyvi við løn tveir dagar um árið til skeið, fundir ella annað Yrkisfelagsvirksemi.

Tá ið Føroya Lærarafelag søkir um farloyvi fyri álitisfólk til skeið og fundir, eigur skúlin at viðgera slíkar umsóknir við vælvild. Sama er galdandi fyri nevndar-og eykanevndarlimir í Føroya Lærarafelag.

§ 5. Verður álitisfólk uppsagt, skal uppsøgnin viðgerast millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið. Við uppsøgnini skal fylgja holl skrivlig grundgeving fyri uppsøgnina. Henda grundgeving verður grundarlagið undir fundinum millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

§ 6. Felagsnevndin hevur skyldu til at hava eina dagførda álitisfólkahandbók við øllum neyðugum reglum, sum eru galdandi fyri lærarar, og kunna álitisfólkini, so hvørt reglurnar broytast.Felagsnevndin skal halda útbúgvingarskeið fyri álitisfólkunum.

Soleiðis avtalað tann 25. januar í 2018, at koma í gildi tann 1. mars í 2019.

Føroya Lærarafelag                                        Fíggjarmálaráðið